## Aker í andróðri

Aker-skipasmiðjan í Florø í Noregi hevur havt nóg mikið at gera, men roknskapurin vísir, at skipasmiðjan fær ov lítið av pengum burtur úr teimum nýggju skipunum. Tey bæði seinastu árini hevur skipasmiðjan havt meiri enn 300 milliónir krónur í halli, og leiðslan sigur, at gongdin hevur ikki verið mætari higartil í ár. Aker-samtakið setti umfatandi tiltøk í verk á skipasmiðjuni í fjør fyri at venda gongdini, men higartil uttan úrslit.



## 88 bankafólk uppsøgd

Fyrradagin fingu 65 starvsfólk í íslendska bankanum Glitnir at vita, at tey noyðast at finna sær annað arbeiði. Hesi somu boð fingu 23 onnur starvsfólk í bankanum fyri fjúrtan døgum síðani, og sostatt hevur Glitnir sagt 88 ella 10 prosent av starvsfólkinum í Íslandi upp. Hetta er fyrstu ferð, at so nógv íslendsk bankafólk eru uppsøgd í einum. Gamla metið átti Landsbankin, sum eina ferð í 1994 koyrdi 64 av sínum starvsfólkum til hús.

# Rundkoyring í Gøtudali liðug um ólavsøkutíð



*Arbeiðið at byggja rundkoyring í Gøtudali er byrjað, og ætlandi stendur Føroya største rundkoyring klár at taka í nýtslu á ólavsøku*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Í fyrsta lagi kemur rundkoyringin at gera ferðsluna nógv tryggari, og í øðrum lagi kemur hon at gera ídnaðarøkið í Norðragøtu meira attraktivt, sigur borgarstjórin í Gøtu kommunu, Hans Mourits Foldbo**

GØTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rundkoyringin, sum Landsverk nú letur byggja í Gøtudali, verður hin størsta í Føroyum. Hon fer at hava fýra aktivar "armar" til inn-og útkoyring, men fer at hava møguleikar til tveir armar aftrat.

Tær aktivu útkoyringarnar úr rundkoyringini verða ávikavist til Kambsdals/ Fuglafjarðar, Leirvíkar/ Norðoyggjar, Gøtu/ Skálafjørðin – og síðan verður ein útkoyring inn á nýggja ídnaðarøkið, sum er planerað til eitt nú handilsmiðstøð í Gøtudali.

Tað er eingin loyna, at Landsverk sær fyri sær, at framtíðar vegaføringin millum Norðoyggjar, Leirvík, Fuglafjørð, Gøtu og inn á meginøkið gongur um ein tunnil, sum fer inn í fjallið vestanfyri Gøtudal og kemur útaftur beint sunnanfyri Valaknúkar, uttanvert bygdina í Skálafirði.

Tí fer rundkoyringin, sum nú verður bygd í Gøtudali, at hava møguleikar til tvær íbindingar aftrat, sum ganga vestur í dalin, harav onnur kann førast vestur í komandi tunnilsmunnan.

### Serliga trygdin

Hans Mourits Foldbo, borgarstjóri í Gøtu kommunu, sigur, at tað er Landsverk, sum burtur av hevur uppgávuna við rundkoyringini í Gøtudali um hendi. At gera arbeiði fyri seg, hevur stovnurin fingið fyritøkuna JHR Entreprenørar í Runavík. Tilboðið upp á sjálva rundkoyringina liggur um 3,2 miljónir krónur, og síðan koma ymiskir snøklar aftrat, sum skulu gerast, eitt nú laðingar við Alu-Plast og annað.

- Við møguleikum fyri seks íbindingum, hava vit skilt, at hetta verður størsta rundkoyring í Føroyum, og sambært tíðarætlanini verður hon liðug á ólavsøku.

Borgarstjórin í Gøtukommunu fegnast um, at hetta arbeiði nú er farið í gongd, og í hesum sambandi hugsar hann serliga um trygdina.

- Hetta er eitt vandamikið vegastrekkið við nógvari ferðslu, og vit hava eisini havt fleiri vandamikil ferðsluóhapp í krossinum, har vegurin úr Leirvíkstunlinum kemur oman í Gøtudal.

Hans Mourits Foldbo fegnast serliga um, at rundkoyringin fer at tryggja ferðsluna um hesar leiðir nógv betur.

- Um 8-tíðina á morgni, tá skúlanæmingar og lærarar koyra inn á Kambsdal, stendur mangan bilrøð á vegnum oman úr Leirvíkstunlinum og bíðar eftir at sleppa út á vegin.

Hann væntar, at rundkoyringin fer at "slúsa" ferðsluna nógv betur og fer at gera vegastrekkið lættari at ferðast eftir, samstundis sum trygdin verður størri.



*Á tekningini sæst handilsøkið, sum Gøtu kommuna hevur planerað – og niðari til høgru á tekningini sæst rundkoyringin, sum nú verður bygda*

### Attraktivari handil

Hans Mourits Foldbo ivast heldur onga løtu í, at rundkoyringin fer at gera ídnaðarøkið, sum kommunan hevur planerað og latið privatum at byggja á, nógv attraktivari.

- Tað hevur stóran týdning fyri handilsvirksemið, at bilar, sum koma um hesar leiðir, noyðast at seta ferðina niður í eini rundkoyring, og kunnu velja eina útkoyring inn á handilsøkið.

Hann veit um handil á Vejle-leiðini í Danmark, sum meira at kalla liggur í óbygdum, men sum samstundis liggur við eina rundkoyring.

- Handilin seldi mest landbúnaðarvørur og amboð til landbúnaðin, og eg skilti, at hetta var ein av handlunum á leiðini, sum hevði størsta umsetningin. Tað er so lætt og ómakaleyst at koyra inn á eitt handilsøkið, tá tú kortini hevur sett ferðina niður, og útkoyring er inn á økið. Koyrir tú hinvegin við nógvari ferð eftir høvuðsvegi, skal tú líka sum hava tikið avgerðina frammanundan, um tú steðgar við handilsøkið ella ikki. Annars strýkur tú bara fram við og steðgar ikki á, vísir borgarstjórin á.

Hans Mourits Foldbo væntar, at Gøtudalur sum frá líður kemur at savna rættiliga nógva ferðslu og harvið nógv ferðandi, tá íbindingin kemur við tunli um fjallið og vestur á Skálafjørðin.

- Tá ið so undirsjóvartunnilin kemur millum meginøkið og Skálafjørðin við høvuðsvegaføring av Strondum, inneftir Skálafjørðinum og í ein tunnil, sum gongur beint inn í Gøtudal, verður hetta økið rættiliga sentralt, sigur borgarstjórin í Gøtu kommunu.

# Handilsmiðstøðin í Gøtudali ikki slept

**Hans Mourits Foldbo, borgarstjóri í Gøtu kommunu, avsannar, at kommunan hevur tikið aftur ídnaðarøkið, sum kommunan hevur selt privatum til handils-og tænastuvirksemi**

HANDILSMIÐSTØÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað vóru Poul Arni Jacobsen og Hans Jørgen Djurhuus, sum á sinni skrivaðu undir avtaluna við Gøtu kommunu um handilsøkið í Gøtudali, og tað vóru teir báðir, sum í fyrsta lagi vóru stigtakarar til ætlaðu handilsmiðstøðina.

Sambært avtaluni við Gøtu kommunu hava stigtakararnir keypt tann partin av økinum, har handilsmiðstøðin skal byggjast. Hetta økið er tilsamans 13.120 fermetrar, harav Alu-Plast ætlandi skuldi hava teir umleið 3.000 fermetrarnar.

Fyri einum góðum ári síðan væntaði Hans Jørgen, at teir ætlandi fóru inn á økið um nakrar mánaðir.

- Tað eru nógv viðurskifti, sum skulu fáast upp á pláss, men vit miðja eftir at seta "spakan" í seinni í vár, segði hann í byrjanini av 2007.

Lagt varð aftrat, at Alu-Plast, sum eisini skal byggja á nýggja økinum, fer í gongd heilt skjótt.

### Einki bygt

Enn er einki bygt á ídnaðarøkinum, har handilsmiðstøðin ætlandi skuldi byggjast, og í seinastuni hevur ljóðað, at Gøtu kommuna skal hava tikið økið aftur.

- Men tað er ikki rætt, staðfestir borgarstjórin, Hans Mourits Foldbo.

Hann ásannar, at enn er ikki bygt á økinum, men hann væntar, at okkurt nýtt fer at fyriliggja heilt skjótt.

- Tað eru somu eigarar, sum framvegis hava øki um hendi, og sambært øllum sólarmerkjum at døma verður okkurt at frætta um stutta tíð, sigur borgarstjórin í Gøtu kommunu.



*Enn er einki bygt á nýggja ídnaðar-og handilsøkinum í Gøtudali, sum Gøtu kommuna hevur planerað og selt privatum til handils-og tænastuvirksemi*

*Mynd: Høgni Thomsen*